# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# 30 ára starvsdag hjá LM Electric



1. februar 2008 hevur Hendrik Andreasen 30 ára starvsdag hjá Pf. LM Electric.

Tey fyrstu árini starvaðist Hendrik sum elektrikari, men síðani tíðliga í 80-unum hevur hann verið tekniskur leiðari hjá LM Electric.

Hendrik er útbúgvin elektrikari. Hann fór í læru hjá Tórshavnar Skipasmiðju og var útlærdur í juni 1976. Eftir hetta fór Hendrik at læra til installatør í Odense, og tók hann installatørprógv í januar 1978.

Í sínum langa arbeiðslívi hjá LM hevur Hendrik, saman við øðrum, havt ábyrgd av nøgvum av Føroya størstu el-inleggingum sum t.d. Norðurlandahúsið, Hotel Føroyar, Føroya Handilsskúli, Brunatryggingin, Dimmalætting, SMS, Albert Hall og fleiri av føroysku flakavirkjunum.

Hendrik er 54 ár og ættaður úr Haldórsvík, sonur Edvard og Piddu. Hendrik hevur fimm systkin, Henry, Christian, Helena, Andrea og Marianna. Hendrik er føddur og uppvaksin í Haldórsvík.

Hendrik er sera áhugaður í seyði. Nógv av sínari frítíð nýtir Hendrik til at rokast við seyðahaldi, og líknandi í heimbygdini og í Tjørnuvík. Náttúran hevur hansara stóra áhuga, og oftani er hann túrar í føroysku fjøllunum um summarið.

Hendrik er eisini áhugaður í ítrótti, serliga fótbólti. Hann fylgir væl við hvussu gongst hjá systirsynunum, ið báðir leika við B36, men EB/Streymur hevur eisini hansara stóra áhuga.

Hendrik hevur nógvar dygdir. Hóast sera lítillátin, ger hann altíð sítt arbeiði til lítar. Hann er altíð til reiðar at hjálpa, og við sínum dugnaskapi og arbeiðssemi hava bæði kundar og starvsfelagar stórt álit á Hendriki til stóra gleði hjá fyritøkuni. Við 30 ára royndum er hann eisini ein góður stuðul hjá bæði lærlingum og starvsfeløgum.

## Andlát og jarðarferðir

**Martina T. Kruse** á Eiði, vanliga nevnd Martina hjá Jens Arna, andaðist á Korndalsbýlinum mánadagin, 92 ára gomul.

**Ketty Marie Hamrá** í Hósvík andaðist týsdagin í Landssjúkrahúsinum 84 ára gomul.

Urnan við **Gúnter Wigand** verður jarðsett hósdagin klokkan 13. Farið verður úr kirkjugarðskapellinum.

Kistan við **Jóhan Olsen** við Gøtugjógv fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum hósdagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Gøtu kirkju fríggjadagin kl. 14. Tey ið vilja minnast Jóhan, kunnu lata Gøtu kirkju eina gávu. Konta í peningarstovnunum.

**Gilbert Guttorm Zachariassen,** ættaður úr Klaksvík, búsitandi í Keypmannahavn, andaðist týsdagin, 56 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

# Heðin býráðslimur í 35 ár

Tann 1. januar 2008 vóru liðin 35 ár, síðan Heðin Mortensen tók sæti sum býráðslimur í Tórshavn. Hann hevur sitið í býráðnum út í eitt síðan 1. januar 1973.

Heðin Mortensen varð sum tann yngsti býráðslimurin nakrantíð valdur í Tórshavnar býráð á kommunuvalinum tann 8. december 1972. Síðan er hann átta ferðir afturvaldur. Valskeiðið 2001 til 2004 var hann næstformaður í Tórshavnar býráð, og hetta seinasta valskeiðið hevur Heðin Mortensen verið borgarstjóri í Tórshavnar kommunu.



*Heðin Mortensen á b‡ráðsfundi saman við Jens Mariusi Poulsen og Jógvani Arge*

Við sínum 35 árum í Tórshavnar býráð, er Heðin Mortensen, tann býráðslimur, sum hevur sitið longst yvirhøvur, síðan Tórshavnar kommuna varð sett á stovn í 1909. Tann býráðslimurin, sum hevur sitið næstlongst í býráðnum, er Petur í Gong, sum sat í býráðnum í 34 ár. Síðan eru seks ár niður til Trygva Samuelsen, sum var býráðslimur í 28 ár.

Umframt at hava sitið sum vanligur býráðslimur í Tórshavnar býráð, hevur Heðin Mortensen eisini verið varaborgarstjóri og borgarstjóri í kommununi. Í býráðsskeiðnum 1. januar 2001 til 31. december 2004 var hann næstformaður, og síðan 1. januar 2005 hevur hann verið borgarstjóri í Tórshavnar kommunu.

Menningin av Tórshavnar kommunu hevur verið stór hesi árini, Heðin Mortensen hevur verið virkin í kommunalpolitikki. Hann byrjaði á gomlu kommunuskrivstovuni í Arnes Minde, har Tórshavnar kommuna helt til, áðrenn flutt varð niðan á Vaglið.

Alt er betri skipað í dag, enn tað var fyrr. Tá varð ikki altíð hildið so neyðugt við býarplanum og byggisamtyktum. Men tað er broytt í hesi tíðini, Heðin Mortensen hevur verið uppi í kommunalpolitikki í Havn. Nevnast kunnu verkætlanir sum byggingin á Konmansmýru, sum var fyrsta kommunala útstykkingarætlan, ið gjørd varð í Føroyum. Eysturskúlin er bygdur í hesi tíðini, og Heðin Mortensen var við í bygginevndini fyri skúlan.

Býurin er vaksin munandi í tíðini, Heðin Mortensen hevur sitið í býráðnum. Bæði út í Havnardal og ikki minst niðan í Hoyvíkshagan. Eisini er sjálvur miðbýurin og alt øki í gomlu Havnini nógv fríðkað og ment hesi árini.

Sannar kollveltingar eru farnar fram í gomlu Havnini hesi árini, Heðin Mortensen hevur verið partur av teimum skiftandi býráðunum. Millum heilt stóru málini minnist hann eitt nú gjøgnumføringina av Bøkjarabrekku og eisini R.C. Effersøesgøtu niðan við Trapputrøðni. Tað var ikki smávegis av rumbli, ið stóðst av, tá lendið skuldi fáast til vega til hesar útbyggingar. Fleiri hús flytast og stykkir keypast. Og at tosa við fólk um jørð og mold er ikki bara sum at siga tað.

Hjartamál Heðins hava altíð verið trivnaður, mentan og ítróttur. Og eisini her hevur hann brúkt síni evni væl og víða. Hann hevur millum annað verið formaður í Havnar Róðrarfelag, Havnar Sjónleikarafelag, Tórshavnar Ítróttarráð og ikki minst ÍSF, har hann í meira enn eina fjórðingsøld hevur sitið í ovasta sæti sum formaður og seinnu árini sum forseti.

Heðin Mortensen hevur serliga ans fyri mentan og menning, og hevur hann millum annað staðið fyri at skipað kommunusøguna. Bæði í bókaformi og sum myndasýning.

Hóast hesi mongu ár í kommunalpolitikki í Tórshavnar kommunu, metir Heðin Mortensen seg enn hava nógv eftir at geva kommununi. Verður hann afturvaldur á komandi vali, kann hann fara undir tíggjunda valskeiðið, og tað er rættiliga óvanligt. Um so verður, kann hann byrja sítt tíggjunda valskeið á nýggjárinum 2009. Í sama árið, sum Tórshavnar kommuna fyllir 100 ár.

---

Okkara góða mamma, vermamma, omma og langomma

**Martina T. Kruse**

Eiði

andaðist mánadagin 28. januar 2008
á Korndalsbýlinum, 92 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Eiðis Kirkju fríggjadagin
1. februar 2008, kl 14.00.
Sungið verður úr sálmabókini.

*Vegna tey avvarandi*

**Hanna, Tia og Olaf við familjum**

Tey, ið vilja minnast Martinu, kunnu lata Korndalsbýlinum eina gávu.

---

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæra kona, mamma, omma og langomma

**Ketty Marie Hamrá**

andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin
29. januar 84 ára gomul.
Kistan fer úr kapellinum fríggjadagin 1. februar kl.15.
Jarðarferðin verður úr Hósvíkar kirkju
leygardagin 2. februar kl. 13.

**Magnus, Marita, Ali, Annika og Hannemi**

Tey, ið vilja minnast Ketty kunnu lata Reyða Krossi eina gávu.
Konta í peningastovnunum.